## Nýggja Ritu um tvey ár

Arbeiðsbólkurin, sum arbeiðir við at útvega nólsoyingum eitt nýtt strandfaraskip ístaðin fyri Rituna, sigur, at tað nýggja skipið eigur at vera liðugt á sumri í 2009. Bólkurin ímyndar sær eitt skip, sum skal hava pláss fyri 180 ferðafólkum um veturin og heldur fleiri um summarið. Harumframt skal skipið kunna taka tveir stórar bilar, so oljubilar, renovasjónsbilar og onnur stór akfør kunnu koma í oynna, sigur Jákup av Skarði, formaður.



# Røkke og Ervik fara at vinna »kampin« um krill

**Aker BioMarine og Ervik Marine Service liggja væl fyri at fáa eitt ella fleiri av teimum fýra permanentu loyvunum til veiði eftir krill í Suðuríshavinum. Tað eru royndirnar hjá feløgunum á hesi veiði, sum geva teimum fyrimunirnar**

KRILL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Tað eru 20 lond, sum umsita fiskiskapin á leiðunum í Suðuríshavinum, har veiðan eftir krill fer fram. Mett verður, at tilfeingið á leiðini er rættiliga stórt*

IntraFish í Noregi hevur hugt at, hvørji feløg av teimum 11-12 í Noregi, sum søktu um loyvi at veiða krill í Suðuríshavinum, liggja best fyri at fáa tey fýra loyvini, sum skulu latast.

### Hava fyrimunir

At veiða krill er ikki bara sum at siga tað, og tað gevur stórar fyrimunir, um tú hevur royndir og kunnleika til hesa veiði.

IntraFish ivast tí ikki í, at feløgini, Aker BioMarine, sum Kjeld Inge Røkke stendur aftanfyri og Ervik Marine Service hjá Jørgen Ervik, verða tung á vágskálini, tá norska fiskivinnuumsitingini fer at taka støðu seinni í hesum mánaðinum.

Hesi bæði feløgin hava royndarfiskað eftir krill í Suðuríshavinum.

### Góðar vónir

Tey tvey royndarloyvini, sum norðmenn áður hava givið, verða nú tikin aftur, og í staðin verða fýra permanent loyvi latin.

Sambært IntraFish vónar Aker BioMarine at fáa tvey av hesum loyvum.

Í ársfrágreiðing felagsins er optimisma um, at felagið fer at fáa í minsta lagi eitt av loyvunum og kanska bæði tvey.

Aker hevur royndarfiskað eftir krill við skipinum Saga Sea, og nú heldur felagið, at "med bakgrunn i signaler fra norske fiskerimyndigheter er selskapet også optimistisk med hensyn på å få utstedt en ny permanent lisens for et nytt krillfartøy.."

Aker BioMarine hevur søkt um loyvi til tvey skip, Saga Sea og Atlantic Navigator, "som skal trekkes ut av fiske rundt Færøyene…"

### Kortini ivi

At útmeldingarnar hjá norskum myndugleikum kortini eru eitt sindur óvissar, skilst eisini á ársfrágreiðingini hjá Aker BioMarine, tí norska felagið hevur eisini søkt argentinsku myndugleikarnar um loyvi at fiska krill í teirra sjógvi.

Í Noreg undra tey seg yvir, at myndugleikarnir bert vilja geva fýra loyvir í Suðuríshavinum, tá mett verður, at stovnurin av hesum smáu dýrum er rættiliga stórur. Men helst er orsøkin hon, at stjórnin vil vera varin, tá tað tilsamans eru 20 lond, sum saman umsita hetta ríkidømi.

IntraFish heldur eisini, at onnur viðurskifti tala fyri, at tað verða Aker BioMarine og Ervik Marine Service, sum fara at fáa loyvini. Fleiri av hinum umsøkjarunum eru feløg, sum eru undir stovnan og onnur, sum í løtuni eingi skip hava til hesa veiði.





*Tvey norsk skip hava royndarfiskað eftir krill, og nú fer norska stjórnin at skriva út fýra permanent loyvi til krillveiði. Aker BioMarine vónar at fáa tvey av hesum*

# Vestmennin

**- Vit royna at halda fast um, at stevnan ikki verður ein bygdastevna, soleiðis sum vit kenna tær aðrastaðni, men at hetta framhaldandi verður ein bátastevna við tí, sum hoyrir eini slíkari stevnu til, sigur forkvinnan í VÍF, Jóngerð Nielsen**

BÁTASTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgin skipa vestmenningar aftur fyri bátastevnu í Vestmanna, og hetta er soleiðis vorðið eitt afturvendandi tiltak, ið vestmenningar gera nógv burtur úr.

Jóngerð Nielsen, forkvinna í VÍF, sigur, at tað er vorðið tradition, at nógvir bátar møtast úti í Hesti kvøldið fyri stevnuna í Vestmanna.

- Í fyrsta lagi fara fleiri bátar úr Vestmanna út í Hest, men vanligt hevur eisini verið, at bátar úr øðrum økjum, sum eru ávegis til Vestmannar, eisini fara út higar. Í Hesti kóka teir seyðarhøvd og eta annan føroyskan mat. Teir ganga ímillum bátarnar og hugna sær saman. Og kanska hevur onkur harmoniku ella guitar við.

### Við Fútaklett

Jóngerð Nielsen sigur, at tíðliga seinnapartin leygardagin møtast allir bátarnir við Fútaklett við gamla bátinum, Ólavi, á odda, og av Fútakletti gongur so leiðin inn á Vestmanna.

Tað er VÍF og serliga kappróðrarnevndin hjá felagnum, sum saman við nógvum góðum fólki – og góðum stuðlum – stendur aftanfyri bátastevnuna.

Peningurin, sum er til avlops á stevuni, fer til kappróðrarneyst, og soleiðis verður eisini hesaferð.

# Gongur tyngri at framleiða

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Á seinasta túri hjá Atlantic Navigator, sum byrjaði fyri einari viku síðan, vóru fleiri nýggj andlit at síggja umborð.

Nú tíðin hjá skipinum í føroyskum sjógvi styttist, er tað ikki so áhugavert longur at vera umborð. Fólk vita, at tað bara er ein spurningur um tíð, nær skipið seinastu ferð loysir í Føroyum.

Tá ein partur av fólkinum er nýggjur og óroyndur umborð á einum verksmiðjuskipi, er skjótt, at onkur fløskuhálsur kemur í framleiðsluna.

Sum Sosialurin hevur skilt, noyddust fólk í byrjanini av túrinum at bróta vakt, tí trupult var at fáa alt at ganga hond úr hond, sum neyðugt er, um framleiðslan skal vera optimal. Tað tekur sína tíð at venja nýggj fólk við framleiðslugongdina, men teir seinnu dagarnar hevur framleiðslan gingið betur, skilst.

Á seinasta túri hevði Atlantic Navigator 1200 tons av surimi og 430 tons av mjøli.

Spurningurin er nú, hvussu nógvar túrar Atlantic Naviator ger aftrat í føroyskum sjógvi. Svartkjaftakvotan minkar, og hon minkar í stórum, tá nógv skip eru á veiðini í senn.

Skipini fiska av felags kvotu, og herfyri vóru bert eini 50.000 tons eftir av samlaðu kvotuni.